## Tíðirnar broytast

**– Nógv ung arbeiða í dag, men tað tykist ikki at vera so nógv arbeiðspláss til ungar dreingir á landi sum til genturnar, sigur Herman Oskarsson, stjóri á Hagstovu Føroya**

UNG OG PENGAR
*Sigga-Maria/Fríða*

Herman sigur, at ung eru farin meira út á arbeiðsmarknaðin, enn hvat tey hava verið. Serliga vóru tað krambúðir, har tær ungu genturnar arbeiða. Men arbeiðsstøð til dreingir eru ikki nógv av. Summir dreingir velja heldur at fara til skips í summarfrítíðini, enn arbeiði á landi.

- Tey ungu í dag vinna rættuliga nógv, og hava tí ráð at nýta peningin til merkivørur og líknandi, sigur Herman Oskarsson.

Tað førir við sær, at meira verður flutt inn. Tó verður vøran ikki dýrari, men úrvalið størri. Tað hevur so aftur við sær, at nógv matstøð verða bygd, sum til dømis Burger King.

Tess meira tey ungu vinna, tess meira støð, har tey kunnu nýta peningin, verða bygd. Hetta er bæði gott og ringt fyri samfelagið, greiðir Herman Oskarsson frá.

– Vansarnir við tí, kunnu verða, at tann einstaki í samfelaginum, ikki lærir at spara, tí har er so nógv at nýta peningin til, sigur Herman Oskarsson.

- Tað góða við tí, er, at um vit nýta nógvan pening, gevur tað tekin uppá at har eru meira pengar í samfelagnum. Tíðirnar broytast og tað ger samfelagið eisini, endar Herman Oskarsson.


*Herman Oskarsson sigur, at ung í Føroyum í dag vinna nógvar pengar, tí tey arbeiða nógv*


*Sigga-Maria Hjalmarsdóttir Højgaard og Fríða Marjunadóttir Thomsen hava verið í starvsvenjing á Sosialinum, og tær hava millum annað arbeitt við eini kanning av peninganýtslu millum ung í Venjingarskúlanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ung og peninganýtsla

**Ein kanning um ung og peninganýtslu teirra, sum praktikantar á Sosialinum hava gjørt, vísir peninganýtsluna millum ung í framhaldsdeildini á Venjingarskúlanum í Havn. Meira enn helvtin av teimum spurdu nýta millum 100 og 500 krónur um mánaðin**

KANNING
*Sigga-Maria/Fríða*

Í vikuni, sum fór, vóru vit úti á Venjingarskúlanum og deildu út spurnarbløð til framhaldsdeildina. Hetta spurnarblaðið snúði seg um peninganýtsluna hjá teimum ungu millum 14 og 17 ár. Vit spurdu 100 ung, nakrar spurningar. Til dømis spurdu vit, um tey hava fartelefon.

Heili 97% hava fartelefon, meðan bert 3% onga hava. Síðan vórðu tey, ið hava fartelefon, spurd, hvussu nógvur peningur verður nýttur til hetta, um mánaðin. Prosentini vóru deild ymisk:

- 50% nýttu ............................... 50 – 100 kr.
- 32,3% nýttu ............................ 100 – 200 kr.
- 14,6% nýttu ............................ 200 – 500 kr.
- 3,1% nýttu .............................. 500 – hægri.

Eisini spurdu vit, hvussu nógvan pening tey ungu hildu seg brúka í alt, um mánaðin:

- 8% nýttu ................................ undir 100 kr.
- 57% nýttu .............................. 100 – 500 kr.
- 18% nýttu .............................. 500 – 1000 kr.
- 10% nýttu .............................. 1000 – 2000 kr.
- 7% nýttu ................................ 2000 – hægri.

Og hvat tey brúka peningin til:

- 18,9% nýttu sín pening til dans og líknandi
- 28,4% nýttu sin pening til klæðir.
- 26,3% nýttu sin pening til góðgæti.
- 26,4% nýttu sín pening til annað, til dømis fløgur og telduspøl og so framvegis.

Fyri at nýta pening, má peningur vera til taks. So vit hildu tað vera viðkomandi at spyrja tey, hvaðani tey fáa peningin, um tey arbeiða ella fáa lummapening. Har var rættliga javnt, 46,2% arbeiða, 49,6% fáa lummapening, meðan 4,2% hvørki arbeiða ella fáa lummapening. Flestu teirra hildu seg hava pening eftir, tá mánaðurin er liðin.

### Hugburðsbroyting

Vit fóru eisini út og spurdu nøkur vaksin, hvat tey hildu um peninganýtsluna hjá teimum ungu. Har vóru ymiskar meiningar, men tó vóru øll samd um, at lýsingar ávirkaðu ungdómin. Tey halda eisini, at ung brúka sera nógvan pening uppá mótaklæðir og at fara í býin um vikuskiftini.

Tí settu vit teimum spurningin: "Hvat kundi verðið gjørt, fyri at minka um peninganýtsluna hjá teimum ungu?" Nøkur svaraðu, at kvota kundi verðið sett á kontoina. Onnur hildu fyri, at tey ungu kundu sjálvi vinna sær pening og síðani ráða yvir teimum. Uppaftur onnur hildu, at foreldrini skulu hava ábyrgdina av hesum, meðan ein heilt onnur meining var, at tað er neyðugt at upplýsa tey ungu og harvið gera tey meira tilvitandi um teirra egnu val.

– Tað ræður um, at fáa tey ungu at hugsa meiri um, hvussu tey velja at nýta sín pening,og at læra tey, at tað ikki er neyðugt at "muga hava" tað, sum lýsingar siga er "cool". Og mest av øllum, ræður um at gera tey tilvita um, at tey eru nakað í sjálvum sær, sigur ein av teimum spurdu.

### Lýsingar ávirka

Í samband við einari verkætlan, í Eysturskúlanum, var ein okkara við í einum bólki um sama evni, ung og peninganýtsla. Bólkurin var hjá Petur & Petur, Kall og Føroya Tele, og settu nakrar spurningar, um hvussu tey hildu seg ávirka tey ungu. Fyritøkurnar vóru rættliga samdar um, at lýsingarnar skula vera stuttligar og ungdómligar, nakað tey ungu kunnu samanbera seg við. Tí tey ungu í dag vita, hvat tey vilja hava.

Fyritøkurnar, sum rætta seg móti teimum ungu, mugu laga seg eftir krøvunum, ið tey ungu seta.

Henda marknaðarføring hevur stóran týdning fyri at fanga áhugan hjá teimum ungu, vísti tann kanningin millum annað.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Leikpallur Føroya

**Ársins »Herðaklapp« sjónleikaviðurkenning verður latin á Grækarismessu**

HERÐAKLAPP
*Tíðindaskriv*

Sjónleikavirksemið er sera virkið í Føroyum. Í Tórshavn verður nærmastu dagarnar ikki færri enn 3 stórar frumsýningar. Havnar Sjónleikarfelag frumsýnir leygardagin 13. mars leikin »Sleeping around«. Norðurlandahúsið frumsýnir týsdagin 9. mars stóra sangleikin »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið« og Gríma fer eisini í mars at frumsýna leikin »Vakurleikadrotningin frá Leenane«. Bæði í Gøtu og í Klaksvík verða leikir sýndir í løtuni. Hesir eru ávíkavist »Hin sjúkuræddi« og »Kaktusblóman«. Aðrastaðni í landinum verður arbeitt við leiki. Leikhúsið Gríma hevur sýnt fleiri leikir hetta leikárið. Og MáF skipar í næstum fyri áhugaverdum skeiði í »viewpoint«-leikhátti og røddvenjing. Eisini eru 2 sjónleikaskúlar í Havnini. Teir eru Dramaverkstaðið hjá Hjørdis Johansen og Sjónleikarskúlin í Sjónleikarhúsinum.

Men hóast hetta virksemi er eisini neyðugt á annan hátt at kasta ljós á sjónleikin og tað stóra arbeiði, ið liggur aftanfyri, hvørja einastu ferð leikur kemur fram á pallin.

Leikpallur Føroya gjørdi tí av í 2001 at gera hetta meira sjónligt við í framtíðini at geva ársins »herðaklapp« á stovningardegi Leikpalsins ið er 12. mars.

»Herðaklappið« er pengaupphædd upp á 12.000,- kr. ið er ætlað sum ískoyti til ferð í útheimin at hyggja at sjónleiki. Umframt er tilevnað gríma og silvurnál til meira varandi minni.

»Herðaklappið« kann verða latið einstaklingi ella felag, sum á einhvønn hátt hevur skarað framúr á leiklistarliga økinum. Til at gera av hvør skal fáa herðaklappið, er sett nevnd við 2 limum fyri Leikpall Føroya og einum limi fyri Føroya Blaðmannafelag. Hesi eru: Dánjal Joensen, formaður, Dagny Joensen, skrivari og Karin Kjølbro.

Tey, ið áður hava fingið hesa viðurkenning eru Lina Larsen, sjónleikari, Hans Tórgarð, sjónleikari og Hjørdis Johansen, sjónleikalærari og stovnari av sjónleikaskúlanum Dramaverkstaðið.

At leiklistin er tíðandi táttur í mentanarlívi okkara sæst eisini aftur m.a. í at Løgtingið 22. apríl 2003 samtykti lóg um Tjóðpall Føroya, ið endaliga skuldi koma í gildi frá 1. januar 2004. Samstundis skuldi Leikpallur Føroya, ið hevur virkað síðani 12. mars 1989, niðurleggjast. Men orsakað av, at val varð útskrivað, er Tjóðpallur Føroya ikki komin at virka enn, og Leikpallur Føroya heldur fram, til fíggjarløgtingslógin fyri 2004 er samtykt.

Hvør, ið fær hendan heiður í ár, verður avdúkað Grækarismessudag kl. 17.00 í Hans Andreasarhúsi, har øll, ið hava áhuga, eru vælkomin.


*Tey, ið áður hava fingið hesa viðurkenning eru Lina Larsen, sjónleikari, Hans Tórgarð, sjónleikari og Hjørdis Johansen, sjónleikalærari og stovnari av sjónleikaskúlanum Dramaverkstaðið*

**Dagurin**

**11. mars, Thala**. Økend ung genta, sum tíðliga í fornkirkjuni varð tikin av døgum fyri trúgv sína.

## ÍSF og Atlantsflog gjørt avtalu


*Heðin Mortensen og Magni Arge skriva undir avtaluna*

Nýggj avtala gevur ítróttarfeløgum munandi betri møguleikar at taka lut í kappingum uttanlands

Atlantic Airways hevur gjørt eina nýggja avtalu við Ítróttarsamband Føroya um ferðing uttanlands. Avtalan hevur við sær, at tey 15 sersambondini undir ÍSF fáa avsláttur í kostnaðinum, tá ið tey ferðast uttanlands á føroyskum veingjum.

Avtalan varð undirskrivað av Magna Arge, stjóra í Atlantic Airways, og Heðin Mortensen, forseta í ÍSF, og í ÍSF dylja tey ikki fyri, at hann er fegin um avtaluna.

- Hon betrar um møguleikan hjá føroyskum landsliðum at ferðast til tiltøk uttanlands og útlendskum landsliðum at koma hendan vegin undir skipaðum viðurskiftum og fyri ein fastan, sámiligan prís. Sostatt er hon við til at styrkja føroyska landsliðsarbeiðið, og betra um møguleikarnar hjá føroyskum ítróttarfólkum at umboða og marknaðarføra Føroyar úti í heimi," sigur Sølvi R. Hansen, ítróttaráðgevi

**-jm**

# Syng við í høllini á Hálsi

**Leygarkvøldið bjóða klaksvíkingar til spennandi sangløtu í ítróttarhøllini á Hálsi**

SANGLØTA
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Høvuðsendamálið við sangløtuni, sum Yngra Kvartettin úr Betesda í Klaksvík skipar fyri, er at fáa fólk at syngja við. Men eisini verður annað áhugavert á skránni hetta kvøldið.

Ungfólk fara at framføra ein leik, ið tey kalla "hendur", og eisini verður eitt filmsbrot á skránni.

Yngra Kvartettin hevur verið á eini rundferð í Føroyum í vetur, sum byrjaði Mentanarhúsinum í Fuglafirði og endar í ítróttarhøllini á Hálsi.

Umframt eina slíka sangløtu í ítróttarhøllini í Klaksvík, hava teir eisini vitjað á Tvøroyri og í Vágunum.

Sangløturnar hjá kvartettini hava fingið sera góða undirtøku kring alt landið.



*Leygarkvøldið skipar Yngra Kvartettin úr Betesda í Klaksvík fyri eini sangløtu, har eisini framførsla og filmsbrot verður á skránni. Myndin er tikin á eini slíkari sangløtu á flogvøllinum í Vágunum herfyri*

*Mynd. Magnus Gunnarsson*